menta
skrásettir grannskoðarar

# Svimjisamband Føroya

## Tórshavn

(V-tal 382.019 / 623.032)

# Ársfrásøgn

## 2024

Ársfrásøgnin er framløgd og góðkend á aðalfundi tann 20. mars 2025

Janus Rein,
fundarstjóri

menta
skrásettir grannskoðarar

# INNIHALDSYVIRLIT


| | Síða |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið | 2 |
| Leiðsluátekning | 3 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 4 |
| Nýttur roknskaparháttur | 5 |
| Rakstrarroknskapur fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2024 | 6 |
| Fíggjarstøða pr. 31. desember 2024 | 7 |
| Notur | 8 - 9 |

## UPPLÝSINGAR UM FELAGIÐ

**Felagið**

Svimjisamband Føroya
FO-110 Tórshavn, Gundadalur

| | |
|---|---|
| Telefon: | +298 607 559 |
| T-postur: | ssf@ssf.fo |
| Heimasíða: | www.ssf.fo |
| V-tal: | 382.019 |
| Stovningarár: | 1980 |
| Roknskaparár: | 1. januar til 31. desember |

**Nevnd**

Rókur í Jákupsstovu, formaður
Johan Martin Thorsteinsson, næstformaður
Gunnvá Thomsen, skrivari
Sabina Poulsen, nevndarlimur
Annika J. Olsen, nevndarlimur
Signhild Joensen, íðkaraumboð
Rúni Gaardbo, tiltakslimur

**Grannskoðari**

**MENTA SP/F**
skrásett grannskoðanarvirki
J. Broncksgøta 16
Postboks 16, FO-110 Tórshavn
Telefon 780 900, Telefax 319 640
t-postur: menta@menta.fo
www.menta.fo

# LEIÐSLUÁTEKNING

Nevndin, ið hevur ábyrgdina av ársfrásøgnini, hevur í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2024 hjá Svimjisamband Føroya.

Ársfrásøgnin er sett upp samsvarandi lógum felagsins og tillagað ásetingunum í galdandi føroyskum roknskaparleiðbeiningum. Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við niðanfyristandandi nýttum roknskaparhátti, umframt eftir "Reglugerð fyri grannskoðan av sersambondum frá 24. februar 2025".

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi soleiðis, at ársfrásøgnin vísir eina rætta mynd av ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni og úrsliti av virksemi felagsins í roknskaparárinum.

Ársfrásøgnin fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2024 verður hervið løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Tórshavn, tann 20. mars 2025

Nevnd:

| | |
|---|---|
| Rókur í Jákupsstovu<br>formaður | Johan Martin Thorsteinsson<br>næstformaður |
| Gunnvá Thomsen<br>skrivari | Sabina Poulsen<br>nevndarlimur |
| Annika J. Olsen<br>nevndarlimur | Signhild Joensen<br>íðkaraumboð |

menta
skrásettir grannskoðarar

## ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA UM VÍÐKAÐ GJØGNUMGONGD

**Til limirnar í Svimjisamband Føroya**

**Niðurstøða**
Vit hava útint víðkaða gjøgnumgongd av ársroknskapinum hjá Svimjisamband Føroyar fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2024. Ársroknskapurin, ið fevnir um nýttan roknskaparhátt, rakstrarroknskap, fíggjarstøðu og notur, er gjørdur eftir lógum felagsins. Umframt eftir "Reglugerð fyri grannskoðan av sersambondum frá 24. februar 2025".

Við støði í útinta arbeiðinum er tað okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2024 og av úrsliti av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2024 samsvarandi nýttu roknskaparreglum.

**Grundarlag undir niðurstøðuni**
Vit hava útint okkara víðkaðu gjøgnumgongd í samsvari við føroyska váttanarstandardin fyri smærri virkir og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralóggávuni um víðkaða gjøgnumgongd av ársroknskapinum, ið er gjørdur eftir nýttum roknskaparreglum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er neyvari útgreinað í brotinum niðanfyri "Ábyrgd grannskoðarans fyri víðkaðu gjøgnumgongdini av ársroknskapinum". Vit eru óheft av felagnum í samsvari við altjóða etisk krøv fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum, og hava fylgt etisku skyldunum, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Okkara fatan er, at vit hava fingið nøktandi og hóskandi prógv, ið kunnu verða grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Nevndarábyrgd av ársroknskapinum**
Nevndin hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við nýttu roknskaparreglum. nevndin hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið nevndin metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, er tað ábyrgd nevndsins at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og, har tað hevur týdning, at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, at gera ársroknskapin eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at nevndin hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum ella, at nevndin í roynd og veru ikki hevur annan møguleika.

**Ábyrgd grannskoðarans fyri víðkaðu gjøgnumgondini av ársroknskapinum**
Okkara ábyrgd er at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Hetta krevur, at vit leggja til rættis og fremja gerðir við atliti til at fáa avmarkaða vissu fyri okkara niðurstøðu um ársroknskapin og harumframt útinna vit serstøku arbeiðini, ið eru áløgd við atliti til at fáa størri vissu fyri okkara niðurstøðu.

Ein víðkað gjøgnumgongd fevnir um gerðir, ið fyrst og fremst eru fyrispurningar til leiðslu, og har tað er gagnligt til onnur í virkinum, greiningar og tey serstøku arbeiðini, ein víðkað gjøgnumgongd áleggur, umframt at mett verður um tey prógv, ið eru fingin til vega. Vavið av tí arbeiði, sum verður gjørt í sambandi við víðkaða gjøgnumgongd, er minni enn ein grannskoðan, og tí geva vit ikki ársroknskapinum eina grannskoðanarniðurstøðu.

Tórshavn, tann 20. mars 2025

**MENTA Sp/f**
skrásettir grannskoðarar

Fríða Óladóttir Poulsen
skrás. grannskoðari

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

### Alment
Ársfrásøgnin er gjørd eftir niðanfyri standandi roknskaparreglum og eftir reglugerð fyri grannskoðan av sersambondum frá 24. februar 2025. Roknskaparhátturin er óbroyttur frá í fjør.

### Alment um innrokning og virðisáseting
Inntøkur verða rakstrarførdar, so hvørt sum tær verða vunnar. Sama er við virðisjavning á fíggjarligum ognum og skyldum. Allur kostnaður, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verður rakstrarførdur við av- og niðurskrivingum, svarandi til roknskaparárið.

Ognir og skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at framtíðar fíggjarligir fyrimunir fara at koma flokkinum tilgóðar og virðið á ognunum og skyldunum kann metast álítandi. Ogn og skyldur verða fyrstu ferð tiknar við til útveganarvirði og eftir tað verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur, sum gjøllari lýst niðanfyri.

Tá ið ogn og skyldur verða innroknaðar og virðisásettar, verður lagt upp fyri væntaðum tapi og váða, ið vísir seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum avsanna ella sanna viðurskifti, ið komu til greinar við árfrásagnarframløgu.

## Rakstrarroknskapurin

### Inntøkur
Inntøkurnar eru øll goldin ársgjøld, lýsingar- og og luttøkugjøld í rakstrarárinum, umframt játtaðar stuðulsinntøkur.

### Rakstrar- og fíggjarkostnaður
Allur rakstrar- og fíggjarkostnaður til høvuðsrakstur sambandsins, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verður rakstrarførdur svarandi til rakstrarárið.

### Starvsfólkakostnaður
Starvsfólkakostnaður, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verða rakstrarførd svarandi til rakstrarárið. Starvsfólkakostnaðir eru lønir, eftirlønir og lønartengd gjøld.

## Fíggjarstøða

### Materiell støðisogn
Felagið hevur onga materiella støðisogn.

Útbúnaður fyri minni enn kr. 20.000 pr. eind verður kostnaðarførdur í útveganarárinum.

### Áogn
Áogn verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, ið vanliga svarar til áljóðandi virði, við frádrátti og niðurskriving ímóti tapi. Eingin ogn er í fremmandum gjaldoyra.

### Peningur
Peningur er tøkur innlánspeningur.

### Tíðaravmarkingar
Neyðugar tíðaravmarkingar eru gjørdar.

### Fremmand skuld
Øll stuttfreistað skuld er tikin við til niðurgoldið (amortiserað) útveganarvirði, ið vanliga er áljóðandi virði roknskapardagin. Eingin skuld er í fremmandum gjaldoyra.

## RAKSTRARROKNSKAPUR

| | Notur | 2024 | 2023 |
|---|---|---|---|
| **Inntøkur:** | | | |
| Stuðul til úrvalsítrótt | 1 | 300.000 | 200.000 |
| Aðrar inntøkur | 2 | 1.806.027 | 1.720.253 |
| **Inntøkur tilsamans** | | **2.106.027** | **1.920.253** |
| **Kostnaðir:** | | | |
| Úrvalskostnaðir | 3 | -314.844 | -200.000 |
| Rakstrarkostnaðir | 4 | -1.026.657 | -1.130.308 |
| Fyrisitingarkostnaðir | 5 | -537.087 | -287.913 |
| Starvsfólkakostnaðir | 6 | -342.915 | -256.309 |
| **Kostnaðir tilsamans** | | **-2.221.502** | **-1.874.530** |
| **ÁRSÚRSLIT** | | **-115.475** | **45.723** |

## FÍGGJARSTØÐAN TANN 31. DESEMBER

| OGN | 2024 | 2023 |
|---|---|---|
| Áogn Úrval | 0 | 200.000 |
| Skuldarar | 78.400 | 88.463 |
| Meirvirðisgjald | 3.438 | 0 |
| **Áogn tilsamans** | **81.839** | **288.463** |
| Innlánspeningur | 1.309.389 | 1.032.421 |
| **Tøkur peningur tilsamans** | **1.309.389** | **1.032.421** |
| **OGN SAMANTALT** | **1.391.227** | **1.320.884** |

| | | |
|---|---|---|
| **SKYLDUR** | | |
| Eginpeningur við ársbyrjan | 1.081.190 | 1.035.467 |
| Flutt frá rakstri | -115.475 | 45.723 |
| **Eginpeningur við ársenda** | **965.715** | **1.081.190** |
| Skuld til peningastovn | 34.387 | 15.220 |
| Skuld til Úrval | 151.848 | 115.593 |
| Vøru- og tænastuognarar | 239.277 | 90.719 |
| Meirvirðisgjald | 0 | 18.163 |
| **Skuld tilsamans** | **425.513** | **239.694** |
| **SKYLDUR SAMANTALT** | **1.391.227** | **1.320.884** |

menta
skrásettir grannskoðarar

## NOTUR

| | 2024 | 2023 |
|---|---|---|
| **Nota 1. Stuðul til úrvalsítrótt** | | |
| Stuðul til úrvalsítrótt | 300.000 | 200.000 |
| | **300.000** | **200.000** |
| | | |
| **Nota 2. Aðrar inntøkur** | | |
| Stuðul frá ítróttarvedding | 1.067.724 | 1.080.082 |
| Inntøkur kappingar | 490.405 | 498.866 |
| Inntøka merkjaskipan (svimjimerkir) | 0 | 25.192 |
| Sponsorinntøkur | 0 | 100.000 |
| Aðrar altjóða stevnur | 206.255 | 0 |
| Inntøkur ráðstevna og gallaveitsla | 39.823 | 0 |
| Aðrar inntøkur | 1.819 | 16.113 |
| | **1.806.027** | **1.720.253** |
| | | |
| **Nota 3. Úrvalskostnaðir** | | |
| Úrvalsítróttarkostnaðir undanfarin ár | -14.844 | 0 |
| Úrvalsítróttarkostnaðir | -148.152 | -84.834 |
| Afturbering til Úrval | -151.848 | -115.166 |
| | **-314.844** | **-200.000** |
| | | |
| **Nota 4. Rakstrarkostnaðir** | | |
| FM Kappingar | -114.907 | -145.925 |
| Oyggjaleikir | -193.357 | -54.509 |
| Heimsmeistarastevnur | -154.773 | -132.391 |
| Europameistarastevnur | -166.121 | -58.252 |
| Norðurlendskar meistarastevnur | -322.646 | -187.148 |
| Aðrar altjóða stevnur | 0 | -259.961 |
| Landsliðskostnaðir | -7.469 | -24.536 |
| Dómarakostnaðir | -12.025 | -77.520 |
| Lívbjargingarkostnaðir | -6.658 | -16.337 |
| Klæðir/búnar | -158 | -105.141 |
| Ítróttarútgerð | -48.542 | -65.945 |
| Gávur og gravering | 0 | -2.643 |
| | **-1.026.657** | **-1.130.308** |

## NOTUR

| | 2024 | 2023 |
|---|---|---|
| **Nota 5. Fyrisitingarkostnaðir** | | |
| Umboðan FINA, LEN og NSF | -53.588 | -64.696 |
| Ráðstevnur | -281.297 | -13.544 |
| Ráðstevna og galla | -28.801 | 0 |
| Aðalfundur, starvsnevndarfundir og jólahugni | -50.221 | -93.409 |
| Tryggingar | -15.796 | -42.228 |
| Skrivstovuhald og bókhald | -51.407 | -26.004 |
| Telefon og internet | -6.226 | -3.338 |
| Roknskaparhjálp og grannskoðan | -19.275 | -19.275 |
| Ráðgeving og sakførarakostnaður | -21.875 | -12.000 |
| Rentu- og bankakostnaðir | -8.601 | -13.419 |
| | **-537.087** | **-287.913** |

| | 2024 | 2023 |
|---|---|---|
| **Nota 6. Starvsfólkakostnaðir** | | |
| Lønir til fyrisiting | -101.614 | -158.865 |
| Lønir til venjarar | -192.978 | -88.080 |
| Eftirlønir | -35.572 | -16.526 |
| Lønargjøld | -12.752 | -9.364 |
| | **-342.915** | **-256.309** |